

# Ráðstevna um harðskapsgransking

TÍÐINDASKRIV

Ráðstevnudagur í Norðurlandahúsinum 5. september 2005 um norðurlendska harðskapsgransking.

Norðurlendski granskingarstovnurin Nordisk Forskerakademi (Norfa/-Nordforsk) hjá Norðurlandaráðnum/Norðurlendsk a Ráðharrastovninum hevur árini 2000-2005 skipað fyri einum norðurlendskum granskingarátaki at varpa ljós á harðskap í m.ø. mentunarligum høpi, serliga við atliti til harðskap kynjanna millum, í foreldraskapi og í familjuhøpi. Granskingarátakið bar heitið "Køn & Våld" * "Gender & Violence", og vórðu viðkomandi granskarar í øllum norðurlondum bodnir at søkja peningaligan styrk til granskingarverk, sum høvdu til endamáls:

1) at bøta um yvirlitið á verandi kunnleika í og uttan fyri Norðurlond umframt at fáa nýggjan kunnleika fram í ljósið um harðskap og kyn,

2) at skapa og bøta um samband millum granskarar innan harðskapaøkið,

3) at stuðla undir granskingarumhvørvið í Norðurlondum, serliga har granskingin framman-undan stóð veik

4) og at varpa ljós á harðskapsgransking og vekja ans fyri harðskapsgransking í Norðurlondum.

Inn komu 78 umsóknir um tilsamans umleið 67 mill.kr. Játtaðar vórðu umleið 25 mill.kr. til tilsamans 29 granskingarverk. Tíanverri kom eingin umsókn úr Føroyum (sum annars úr Grønlandi og Álandi).

Verkætlanin hevur verið stjórnað av eini nevnd umboðandi hvørt av Norðurlondunum, og hava Føroyar havt eygleiðarastøðu í stýrisbólkinum.

Norðurlandaráðið hevur kent seg hava náttúrliga skyldu til at kunna alment um innkomnu granskingarverkini. Hetta varð gjørt á eini stórari felags ráðstevnu á Gøteborg Universiteti herfyri, men harumframt er peningur játtaður til kunningarátøk í hvørjum Norðurlandi sær, og tískil verður í samstarvi við Fróðskaparsetrið skipað fyri ráðstevnudegi í Norðurlandahúsinum mánadagin tann 5. september 2005 kl. 9.00-16.00, har m.o.

Katrine Sidenius, yvirlækni á "Rigshospitalets Center for Voldtægtsofre" verður við umframt hiðani fólk frá Granskingarráðnum, Fróðskaparsetrinum, Kvinnuhúsinum og væntandi eisini løgregluni.

Ætlanin er eisini at hava eitt panelorðaskifti, har áhoyrarar eisini sleppa framat. Hóast ráðstevnan fyrst og fremst vendir sær til fakfólk innan heilsu-, sosial- og skúlaverk, løgreglu, politikkarar og fjølmiðlar, verður ráðstevnan opin fyri øllum áhugaðum, og verður atgongdin ókeypis.

Vinarliga
Eyðun Joensen,
psykologur

(umboð Føroya í stýrisbólkinum fyri granskingarverkætlanini Køn &Våld hjá Nordisk Forskerakademi)



*Tær báðar – Marianna og Rannvá – hava lagt stóra orku í hesa framsýningina, sum verður at síggja á ólavsøku*

## Føroysk framsýning ferðast kring heimin

**Um ólavsøkuna verður høvi at síggja og uppliva video-installatiónina "Dukkumentar" í nýggjari útgávu. Eftir ólavsøku fer framsýningin til London.**

FRAMSÝNING

Fyrr í ár var installatiónin - ein animation og ein dokumentarfilmur um kreativu gongdina - sýnd fram í smiðjuni í Lítluvík. Hesaferð hava tær báðar Marianna Mørkøre og Rannvá Káradóttir av álvara lagt dent á at vísa video-installatiónina í einum spennandi og ótraditiónellum umhvørvi.

Superdekk hevur latið teimum ein gamlan býbuss, ið er umgjørdur til eitt áhugavert og hugnaligt umhvørvi. Eitt nú hava tær rokast við at tikið setur út, málað og myrkalagt bussin. Eisini hesaferð verður stórur dentur lagdur á at skapa eina listaframsýning, ið hevur ein øðrvísi dám enn tað vanliga hátíðarliga listarúmið, har prýtt verður á prýðiligar hvítar veggir. Endamálið við verkætlanini er at vekja áhugan fyri alternativari list og sostatt økja og breiðka føroysku listakarmarnar.

Í juni var video-installatiónin víst í Berlin, og aftaná ólavsøku verður framsýningin sett upp í London. Tað er Nottinghill Arts Club, ið hevur bjóðað Dukkumentar til Beach-Night, sum er eitt serligt mánaðarligt tiltak, har útvald ung skandinavisk listafólk kunnu sýna fram síni verk. Nottinghill Arts Club er ein sera kendur klubbur fyri nýskapandi list og tónleik í London.

Framsýningin lat upp í gjár og verður opin allar ólavsøkudagarnar.









*Framsýningin letur upp 27. juli kl.17. Opið verður 27.-29. kl. 17-21.*

# Ólavsøku-framsýning

FRÁ LISTAFELAGNUM

Tann árliga framsýningin hjá Listafelagnum letur upp ólavsøkuaftan kl. 14 og endar sunnudagin 31. juli kl. 18 við lutakasti um eitt verk fyri 5.000 kr.

Ólavsøkuframsýningin á einum vegamóti

Í tølum er framsýningin í ár nógv øðrvísi enn undanfarin ár. Tey, ið lótu inn til framsýningina í ár, vóru 33 í tali og innsendu verkini 150.

**Ólavsøkan 2005:**
19 framsýnarar
55 verk á framsýningini
**Ólavsøkan 2004:**
39 framsýnarar
136 verk á framsýningini
**Ólavsøkan 2003:**
40 framsýnarar
145 verk á framsýningini

Umleið helvtin av framsýnarunum í ár sýna fram á fyrsta sinni. Samanborið við undanfarin ár hava verkini á hesi framsýningini hvørt sær betri pláss, og framsýn-ingin kennist tí opin og løtt. Eitt av verkunum er ein video-installatión, annars eru tey olju- og akrylmálningar, pennatekningar, høgg- og standmyndir, ymisk blandað tøkni og foto.

Tey, sum valdu út millum innkomnu verkini vóru Tita Vinther, Eyðun av Reyni og Louisa Lamhauge.

### Listafelagið

Listafelag Føroya hevur til endamáls at stuðla føroyskari list og at stíla fyri framsýningum burturi og heima. Harumframt skipar felagið fyri øðrum listafremjandi tiltøkum, eitt nú fáa limirnir grafisk bløð fyri serprís og innbjóðing sendandi til allar framsýningar hjá Listasavninum. Felagið skipar fyri limakvøldum við fyrilestrum um ávís verk ella listarørslur og ger ferðir uttanlands at hyggja at list. Øll kunnu gerast limir fyri ávikavist 150 kr/árið fyri einstaklingar og 200 kr/árið fyri hjún, virki kunnu eisini vera limir.

Formaður í felagnum er Pál Weihe, Hilmar Høgenni er kassameistari, Marjun Sigurðsdóttir og Annika Marr Poulsen eru nevndarlimir, Malan Marnersdóttir er skrivari.

Listafelagið er stovnað í Keypmannahavn í 1941 við tí endamáli at savna føroysk listaverk og at stovna eina "listagoymslu" í Tórshavn. Síðani Listasavn Føroya var veruleiki hevur felagið stuðlað savninum. Harumframt vil felagið stuðla øðrum listasøvnum í landinum.

### Upplatingartíðir

Ólavsøkuframsýningin er í Listaskálanum. Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag eru framsýningin opin kl. 14-20, leygardagin og sunnudagin 30. og 31. juli kl. 14-18.